gult cyan magenta svart

nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

Heilsanir

Gó›i, elska›i Heri
Hjartaliga tillukku vi› 7 ára degnum 10.9. Jesus pápi signi framtí› tína.
Bestu heilsanir mamma og babba

Gó›a, elska›a fastir
Hjartaliga tillukku vi› degnum tann 8.9. og alt ta› besta í framtí›ini.
Bestu heilsanir frá Noomi og Moniku



Gó›a, elska›a Gu›run
Hjartaliga tillukku vi› 22 ára degnum. Takk fyri mangar stuttligar løtur.
Heilsan beiggi tín Jan He›in



Hey, sviskan!
Ta› var uppá tí›ina, at tú tók rívuna í hond og gjørdi okkurt til nyttu.
Heilsan starvsfelagar
P.S. Hjartaliga tillukku vi› degnum.

Gó›a kona og mamma
Hjartaliga tillukku vi› 31 ára degnum. Okur elska teg.
Heilsan ma›ur og børn

Trúgv tí ella ei, men hesin unglingi bleiv 50 ár 6. sept. Hjartaliga tillukku vi› degnum.
Heilsan ja, hvør man ta› vera

Gó›i Dánjal Johan
Hjartaliga tillukku á fø›ingardegnum ynskja
teir hornutu ni›an fyri vegin og Gísmundur



Hey, hon sjálv!
Tú helt tú slapp undan. Hjartaliga tillukku vi› degnum. Vónandi fáa okur gó›ar bollar, hvør man hava baka›, ha, ha...
Hinar tríggjar ...
P.S. Gle›a okkum til ársskifti›.

Gó›a Esther L‡
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum 8.9. ynskja
omma og abbi

Gó›i, fitti, elska›i Jónas
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum í dag, 9. sept., ynskja
omma, abbi, gumma, fastir og gubbi

nøvn nú **5 ferðir um vikuna** 25,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: .....
.....
.....
.....
.....
.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

FØÐINGAR

20. august fingu Jóngerð og Hanus Sørensen, Viðareiði, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4505 gr.

27. august fingu Tanja og Jan Petersen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 4000 gr.

30. august fingu Nicolina Hansen og Jógvan Kári í Giljum, Vejrup, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3900 gr.

31. august fingu Ester Poulsen og Jónleif Antoniussen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

1. september fingu Miriam og Magnus Jensen, Hov, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3495 gr.

2. september fingu Anny og Hans Niclasen, Nólsoy, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3200 gr.

2. september fingu Nina E. og Petur Even Djurhuus, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

2. september fingu Lis og Gunleif Berjastein, Kambsdalur, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 4500 gr.

3. september fingu Henny á Líknargøtu og Jákup í Stórustovu, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

5. september fingu Rannvá og Kristian Martin Skála, Argir, tvíburðar, dreingir. Tann eini var 48 cm. langur og vigaði 2900 gr. hin var 47 cm. langur og vigaði 2375 gr.

5. september fingu Sunnleyg og Eystein Olsen, Fuglafjørður, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3700 gr.

5. september fingu Beinta við Sandá Lassen og Heini Næs Lassen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4200 gr.

7. september fingu Majbritt og Birgir Christiansen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3150 gr.

ANDLÁT

2. september
Jørgen Kyster, 58 ár

3. september
Astrid Jacobsen, Mykines, 85 ár
Eirika Sigvardsen, Signabø, 70 ár

4. september
Petur Holm, Nólsoy, vanliga nevndur Petur á Geil, 75 ár

Eitt ljós á gøtu míni

»Sælur er tann maður,ið troystar á Harran, og hvørs álit Harrin er; hann verður líkur træi, sum er gróðursett við vatn, og sum toyggir røtur sínar 'Out í løkir og ikki óttast, um hitin kemur, hvørs leyv altíð er grønt, sum ongan vanda hevur í turrum árum og ongtíð lættir av at bera ávøkst«.

Jeremia 17, v. 7-8

Tað er eyðsýnt, at profeturin við hesi myndini av trænum og tess rótum hugsar um okkum menniskju, og hvønn týdning tað hevur fyri okkum,a t vit eru rótfest – at vit eiga røtur, ið stinga djúpt, haðani vit altíð kunnu taka til okkara tað, sum okkum er tørvur á fyri at vera til. Og so er ikki so langt frá hesi mynd at tala um hitt rótfesta, guðsóttandi menniskja, hvørs røtur ikki bara eru knýttar at tí forgongiliga, tí komandi og farandi, men at sjálvum hinum livandi Guði – hann, sum altíð er mentur at halda okkum uppi við sínum lívgandi vatni – tí lívsins kelduvað, ið var skal við til ævigt lív. Nú kudni eisini verið stuttligt at sæð hesa myndina, soleiðis sum træið sær hana – sum Helder Camara, biskupur, hevur sagt, at »tá trøini síggja okkum menniskju, fáa tey samkenslu viðokkum, tí teimum tykir synd í okkum. Tey hald, at vindurin man fara avstað viðokkum, tí at vit menniskju hava jú ongar sjónligar røtur«.

Jú, sæð frá trøunum munnu vit mennsikju tykjast vera sera óstøðugir skapningar, sum synd er í. Altíð í gongd og ávegis, har vit menniskju alla tíðina sjálvi mugu geva okkara lívi meining og innihald uttan at okkum av náttúruni var givið rótfesti og røtur sum øðrum skapningum. Ongar røtur tykjast halda okkum aftur, har vit kanska festu búgv langt heimani og við okkar alívsstarvi ikki komu at breðga ættini tí.

Og kortini kenna vi tøll til, hvussu gomul minnir heimani so mangan taka okkum av ræði. Tá vit eftir mong ár komu heimaftur at vitja, aftur gingu ta gomlu bygdargøtuna – aftur kendu somu ljóð, vælkend mál, og tevjaðu vælkendan royk, háost so mangt vatnið var runnið síðani seinast. Man tað ikki vera tí, at vit menniskju eisini eiga røtur innan í okkum – at vit eru meiri rótfest enn vit mangan sjálvi vilja vera við, og at tað tí er av alstórum týdningi, at vit kenna hesar røtur – tí hvørji eru vit uttan tær?

Guð, gev okkum røtur, ið nema jarðarinnan dýpdir, so at vit botna eisini í farnum tíðum, rótfest í fedranna trúgv. Gev okkum megi at vaksa á tí stinna viðarbulinum, os vit styrkt kunnu verja borg og ikki vikast, tá ið ódnirnar herja. Veit okkum framtíð og lat bløðini grønkast av nýggjum og eftir vetur nýggjar vónir um lív og sælu, og tá heystið er komið, lat okkum bera frukt. Harri, sum eitt træ verði fyri tær mítt lív!

Martin R. Jacobsen

KIRKJUR & SAMKOMUR

Gudstænastur 12. sunnudag eftir Trinitatis

Havnar kirkja: kl. 11, Elsa Funding
Vesturkirkjan: kl. 11, Bergur D. Joensen
Argir: kl. 11, Heri Joensen
Kaldbak: kl. 12, altarg., Sonja Klein
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10.00,
Kunoy: kl. 12.00, (útv.)
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30 Hans Eiler Hammer
Christianskirkjan: kl. 11, lestur
Kollafjørður: kl. 11, altarg., Marjun Bæk
Hósvík: kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen
Bøur: kl. 11, altarg., Inga Poulsen Dam
Skálafjørður: kl. 11, Jógvan Fríðriksson
Sørvágur: kl. 11, David Johannesen
Sandavágur: kl. 11, Emil Olsen
Sandur: kl. 12, Høgni Poulsen
Elduvík: kl. 12, Uni Næs

Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 møti, kl. 22 útimøti (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli kl. 17 møti.

Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og kl. 18 møti við John Johannesen.
Mánakvøldið venur Manskórið kl. 19.55.
Týskvøldið verður bíbliutími kl. 20.00 við Tom Skaale.
Mikukvøldið venur Meinigheitskórið kl. 19.00
Hóskvøldið verður ungdómsmøti kl. 20.00 við Sverra Kass. Evni: Kærleikin millum gentu og drong.

Frelsunarherurin Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 møti, Sofia Jacobsen talar. Eingin sunnudagsskúli, vit luttaka á Svangaskarði, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti, Major Tjáland talar.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin verður eingin sunnudagsskúli. Bussur fer frá Hoyvíkar skúla kl. 12.45 til felags familjutiltakið á Svangaskarði, sum byrjar kl. 14. Tiltakið varir uml. 3 tímar, síðan verður koyrt aftur til Hoyvíkar skúla. Havið matpakka og okkurt drekkandi við. Foreldur eru vælkomin við børnunum. Einki møti sunnukvøldið vegna felags familjutiltakið.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Eiriki og Jórun Skála, Argjavegi 21, har øll eru vælkomin.

Losjan í Havn
Mánadagin 11. sept. kl. 20 verður minningarfundur.

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19 A.T.A.P. (barnaklubbi)
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli. Bussurin til Svangaskarð fer av Rhema kl. 12.30.
Mánakvøldið kl. 20 videomøti á stórskíggja, John Avanzini talar.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 8.30-9.30. Øll eru vælkomin.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma við Esmari Jacobsen, trúboðara.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn, bíbilsøga og videofilmur um dýrini í Valbakkaskóginum, fyrsti partur.

Royndarhúsið í Nólsoy
Leygardagin kl. 14 barnamøti, kl. 16 útimøti (um viðrar) og kl. 20 evangeliskt møti. Sunnudagin kl. 14 barnamøti, kl. 15.30 evangel. møti, Tórmund, Jaspur og fleiri.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin onki møti vegna felagstiltakið á Svangaskarði.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Karmel, Eiði
Møtirøðin byrjar mikudagin kl. 20. Sverri Steinhólm, prestur talar, Hannis Hansen syngur. Bønarløta verður kl. 19.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Møti verður sunnudagin kl. 19. Øll eru vælkomin.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará v/Jón Joensen, høvi verður til at fáa forbøn.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Maybritt og Trúgva Berg, Søldafjørður.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6-7. Verið hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman, við hugna, vitnisburði og sangi, luttøka úr Skopun.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Dánjal Petersen, evnið: trúlovilsið.
Sunnudagin einki møti vegna familjutiltakið kl. 14 á Svangaskarði, havið matpakka og okkurt drekkandi við. http://www.keldan.fo

Missiónshúsið í Leirvík
Ungdómsmøti verður í Missiónshúsinum í Leirvík leygardagin kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Aglow, Suðuroy
Møti verður í Porkeris skúla leygarkvøldið kl. 19. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14, kl. 18 møti við Árna og Ásbjørg. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, talarar D. Peckham og Z. Zachariasen, kl. 21 útifundur (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 uppbygg. fundur, talarar D. Peckham og Z. Zachariasen.
Ónsdagin kl. 20 bønarfundur.

Frelsunarherurin í Vági
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur.
Sunnudagin eingin sunnudagsskúli vegna tiltøk á Svangaskarði, kl. 18 møti við Toril og Niels Edvard Olsen.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið.

Sion, Vágur
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11, sunnudagsskúli kl. 11.30 og møti kl. 16.
Telefonandakt 373 777.

1000 ára haldið
Sunnudagin kl. 12 talar Johs. Andr. Næs í kirkjuni í Fámjin um evnið: Kristindómsundirvísingin í skúlaverkinum.

Læknavaktir

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033.

Eysturoy:
Leygardagin 9. september:
Georg Egholm, tlf. 448016

Sunnudagin 10. september:
Georg Egholm, tlf. 448016

Norðoyggjar:
Leygardagin 9. og sunnudagin 10. september:
Magnus Magnussen, tlf. 455451

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): Tlf. 371560

Suðuroy (suður): Tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

gult cyan magenta svart